# Havnar Bio

UMMÆLI:

# Fótbóltseingilin

## – Filmurin »Goal« er gott undirhald

***Hin ungi Santiago Munez býr í Los Angeles. Hann er frá Meksiko. Sum túsundavís av øðrum er hann komin ólóliga yvir um markið til USA. Stóri áhugin hjá honum er ikki amerikanskur "fotball" ella baseball, men fótbóltur sum tey spæla hann í Evropa og í Suðuramerika. Santiago arbeiðir dagliga saman við pápanum sum gartnari hjá ríkum fólkum og droymir um eitt lív sum professionellur leikari.***

UMMÆLI
*Kim Simonsen*

Munurin millum tey ríku og fátæku í Los Angeles er óhugnaligur. Stóra gleðin í lívinum hjá Santiago er at spæla fótbólt. Í loyndum hevur Santiago dreymin um at gerðast professionellur fótbóltsleikari, men tað er ótrúliga langt frá fátækrabýlingunum í Los Angeles til at spæla professionella fótbólt, sum fyri tað mesta gongur fyri seg í Evropa. Men tað er vist, at Santiago er ein annar Péle, Ronaldo ella David Beckham. sum eisini spælir við í hesum filminum.

**Newcastle United**

Men við eitt verður Santiago uppdagaður av einum fyrrverandi professionellum fótbóltsspælara frá Newcastle United, Glen Foy. Hann er og vitjar í L.A. Við eitt sær hann henda dugnaliga spælaran. Santiago hevur gleðina við at spæla fótbólt, hann hevur eitt "flow", sum man ikki ofta sær.

Glen Foy roynir at fáa ein talentleitara at hyggja eftir honum, men hetta gongur illa. At enda fer hann sjálvur at royna at fáa stjóran í Newcastle United at hyggja at Santiago, Hetta vil hann, men bert um Santiago kemur til Newcastle. Tað er bara ikki so lætt at fara til Onglands hjá einum fátækum ungum manni frá USA. Santiago hevur ongan kjans her, tí hann og familjan eru fátækari enn flest.

At enda kemur Santiago tó til Onglands, sum er eitt undur í sjálvum sær. Her byrjar ein annar partur av filminum, sum eisini er hin besti. Santiago fær ein kjans á liðinum. Stjórin fyri Newcastle setur hann at spæla í einum runutum venjingardysti. Hetta er torført fyri Santiago, ið valla hevur sæð regn fyrr.



**Pofessionelli fótbóltsheimurin**

Vinurin Glen Foy fær at enda Santiago fram at, so hann kann venja við Newcastle í ein mánað. Tað sum er stuttligt við filminum "Goal", er at vit síggja brot úr veruligum dystum. Og senurnar eru tiknar til veruligar Newcastle United dystir frá St. James Park vøllinum. Her skal hann kappast við spælarar, ið hava roynt seg í áravís. Spælarar, ið eru minst líka so áhugaðir í framgongd sum Santiago. Her fáa vit eitt áhugavert innlit í professionella fótbóltsheimin, har tað er sera stórur munur á fólkum. Teir flestu leikarnir eru einki verdir, teir verða skaddir og so er dreymurin horvin. So eru tað stjørnurnar, ið felagið kastar milliónir eftir. Teir koyra í sportbilum, sita á framsta rað til alt her í lívinum.

**Elitan á vøllinum**

Santiago gerðst vinur við spælaran Gavin Harris, ið er ein stjørna. Hesin er tó ein sum ballast ov nógv, so hevur hann ringt orð á sær, tí hann er ein playboy.

Santiago møtir eisini sjúkrasystrini Ros. Hon er ikki serliga áhuga í spælarum vanliga, tí hon heldur at øll tey, ið gerðast kend verða forkelaði og oyðiløgd av hesum.

Stóra temaði í filminum er klassiska leitanin hjá unga menniskjanum eftir einum samleika, kærleikanum og onkrum sum man dugir væl. Hjá Santiago er tað eisini stóri longsulin eftir at pápi hansara skal viðurkenna, at hann kann loyva sær at spæla fótbólt, tí pápin heldur at hetta er fjas. Pápin trýr ikki á dreymar og fják, hann er á ein hátt sera realistiskur, tí hví skal ein ungur meksikanari í L.A. sleppa at spæla í fyrstu deildini hjá Newcastle?

**Enn ein ítróttarfilmur**

Tað finnst eitt hav av filmum um ymiskar ítrottagreinar, sum baseball, kurvabóltur og golf. Allar ítróttagreinar eru nærum umboðaðar í filmsøguni, men tað er ikki nógvir spælifilmar um fótbólt, ið er ein ítróttagrein, sum flest fólk í heiminum hava áhuga fyri.

Vit hava fyrr sæð góðar filmar um frælsan ítrótt, men hetta er eitt boð um fótbólt sum drama.

Í "Goal" hava tey sum hava gjørt filmin veruliga brúkt FIFA og Newcastle United, til at fáa loyvi at gera ein film við ymiskum klubbum, áskoðarum og eykennismerkjum.

Tað er stuttligt at síggja hvussu stóran týdning eitt fótbóltslið hevur í Onglandi. Í býnum Newcastle er nærum einki annað at tosa um enn Newcastle United. Fólk í hesum býinum eru fanatisk, teirra lív er fótbóltur og fótbóltur er teirra lív.

"Goal" er enn ein av hesum ítróttarfilmunum, men hann er ein av teimum góðu innan hesa genruna.

So 4 stjørnur av 6 til "Goal".

**Leikandi:**

| | |
|---|---|
| Santiago Munez | Kuno Becker |
| Glen Foy | Stephen Dillane |
| Gavin Harris | Alessandro Nivola |
| Roz Harmison | Anna Friel |
| Herman Munez | Tony Plana |
| Mercedes | Miriam Colon |

**Leikstjóri:** Danny Cannon. 118 minuttir. Frumframsýning í Havnar Bio og um alt Danmark 30. September. Atgongumerki kosta 70 kr.

TÍÐIRNAR:

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**




### Mål
*FRUMSÝNING*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 30.09 | kl. 18.30 | kl. 21.00 |
| Leygardag | 01.10 | kl. 18.30 | kl. 21.00 |
| Sunnudag | 02.10 | kl. 18.00 | kl. 20.30 |




### 40 Year old virgin

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 30.09 | kl. 20.30 | kl. 23.30 |
| Leygardag | 01.10 | kl. 20.30 | kl. 23.30 |
| Sunnudag | 02.10 | kl. 20.00 | kl. 23.00 |




### Charlie og chokoladefabrikken

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 30.09 | kl. 18.00 |
| Leygardag | 01.10 | kl. 18.00 |
| Sunnudag | 02.10 | kl. 17.30 |




### Cinderella Man

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 30.09 | kl. 23.00 |
| Leygardag | 01.10 | kl. 23.00 |
| Sunnudag | 02.10 | kl. 22.30 |




### Madagascar

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 30.09 | kl. 16.30 |
| Leygardag | 01.10 | kl. 16.30 |
| Sunnudag | 02.10 | kl. 16.00 |

KOMANDI FILMAR:

### Far til fire – gi'r aldrig op
*FRUMSÝNING*

Fríggjadag 07.10

### Duke of Hazzard
*FRUMSÝNING*

Fríggjadag 07.10

www.bio.fo • Telefon 31 19 56